## DAGSINS MEINING

# Ódámlig tekin

Eftir vanlukkuliga valúrslitið í USA hava mong hóvlig í USA og í umheiminum biðið til, at Bush fór at fylgja eini hóvligari linju í sínum politikki, innlendis og á altjóða pallinum, nú politikkurin seinastu árini hevur sett kílar millum amerikanarar og millum USA og umheim. Tey, ið fyri fýra árum síðani trúðu tá nývalda Bush, sum tá segði, at hann fór at søkja móti miðjuni og virka fyri allar amerikanarar, tóku so dyggiliga feil. Hann gjørdi beint tað øvugta, og henda gongd tykist nú at halda fram. Enn eitt stig á víðgongdu høgraleið síni er útnevningin av nýggjum løgmálaráðharra. Bush hevur nevniliga útnevnt løgfrøðiliga ráðgeva sín í Hvítu Húsunum og fyrrverandi ráðgevi sín í Texas, tá hann ráddi fyri borgum har, Alberto Gonzales, at taka við. Hetta boðar sanniliga ikki frá góðum.

Tað gagnar hvørki USA ella umheiminum, at ein víðgongdur og snævurskygdur høgravendur persónur verður settur í tann so týðandi løgmálaráðharrasessin. Okkum tørvar fólk at leiða frælsa heimin, sum hava breitt innlit og forstáilsi og virðing fyri øðrum. Nýútnevndi Gonzales hevur verið oddaráðgevin í Guantanamopolitikkinum hjá forsetanum. Og leita vit aftur til tíðina, tá Bush var guvernørur í Texas, var sami Gonzales hansara næsti løgfrøðiligi ráðgevi. Allir deyðadómar, har søkt varð um grið ella útseting, vórðu avgreiddir av Gonzales. Tað vóru hansara ráð Bush helt seg til, tá hann vendi fingurinum niðureftir í øllum sakunum ella lat vera við at kunna Bush um tær mest týðandi greinarnar í sakunum. Eingin fekk grið, eingin deyðadómur varð útsettur. Bush fylgdi uttan at blunka øllum ráðunum frá ráðgeva sínum. Tí er Bush eisini tann, sum í amerikanskari søgu hevur met í at fullføra deyðadómar. Kalt og kyniskt syrgdu Gonzales og Bush fyri, at ivi ella nýggj prógv skuldu ongantíð koma teim deyðadømdu til góða. Einaferð deyðadømdur, altíð deyðadømdur. Sami Bush fær í dag rós fyri sítt støðufesti. Ja, sama støðufesti átti hann eisini, tá tað ráddi um deyðadómarnar í Texas.

Tað eru tey, sum verja og hámeta Bush, tí hann skal eitast at vera tann einasti og rætti kristni forsetin. Sum um øll onnur eru ókristin. Tað eru so eisini tey, ið halda, at mótstøða móti Bush er tað sama sum at vanvirða og hata hann. Dømi um tað finna vit í grein í blaðnum í dag. Nei, vit hata ikki fyri tað, um vit eru krittisk og ósamd. Vit virða demokratiið, og einki í demokratiinum er meira virðismikið enn møguleikin at kunna vera á varðhaldi, seta spurningar, ávara og finnast at, har tað er neyðugt. Okkara metan er, at Bush og hansara víðgongdu fólk eru ein vandi fyri bæði USA og heimin. Tað ber væl til at standa fyri góðum kristnum virðum uttan at skula taka undir við Bush og hansara fólkum. Vit hava øll okkara rætt til at lesa og tulka Bíbliuna, sum vit halda vera rætt. Eingin hevur patent uppá tí einastu røttu útleggingina. Heldur ikki Bush. At tað eru so mong fólk í USA og eisini her heima, sum hava valt at hava Gamla Testamentið við sínum "eygað fyri eygað hugburði" í sínum skjøldri, er óhugaligt og eisini rættiliga sjálvmótsigandi, tá somu fólk eisini brúka Jesus, sum sín frelsara. Ein Jesus, sum savnaði heldur enn at skapa fíggindar, ein Jesus, sum stóð fyri fyrigeving og tolsemi. Tey, sum halda, at Bush er vandamikil fyri heimin, hava fullgóðan rætt til at finnast at honum, uttan at fáa sett eitt haturs spjaldramerki á seg.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Eldraøkið við atliti til demens

**Teir føroysku demenssamskiparararnir**

Ein heilsan til politikkarar, ið vilja teimum eldru bata.

Vit lesa við áhuga tykkara viðmerkingar í fjølmiðlunum um eldraøkið. Eldraøkið er tað økið, sum eins og barnaansingin verður lagt út til kommunurnar. Tí verður alneyðugt í framtíðini við einum góðum og væl skipaðum eldrapolitikki í kommununum. Tá vit nevna eldrapolitikk, mugu vit eisini nevna demenspolitikk.

Tað verður granskað nógv innan demensøkið í dag og framsagnir siga, at talið av sjúklingum fer at økjast nógv næstu árini. Um vit í Føroyum samanbera við hagtøl frá londunum uttan um okkum, eru tað uml. 450 fólk, 65 ár og eldri, sum eru demens sjúk í dag, og um 20 ár fara út við 600 fólk at hava hesa sjúku.

Hetta fer at stilla stór krøv til kommunurnar, tí er neyðugt, at økið verður væl skipað frá byrjan.

Í vár fingu 18 starvsfólk innan eldraøkið serútbúgving sum demenssamskiparar, soleiðis, at tað í Føroyum nú eru 21 við hesi útbúgving. Vit starvast ymsastaðni í landinum, og umboðan er í øllum 6 økjunum (heimarøktin er býtt upp í 6 øki). So síggjast kann førleikin at ráðgeva er til staðar.

Fólk, sum verða rakt av sjúkuni demens, skulu eins og onnur eldri fólk verða í egnum heimi so leingi sum til ber. Hetta skal stuðlast við at hava eitt gott trygdarnet rundan um tann demensrakta.

Tað ræður um, at sjúkan verður staðfest tíðliga, so viðgerð kann gevast so tíðliga í sjúkugongdini sum møguligt. Sosiala trygdarnetið skal vera gott, og stuðul, vegleiðing og undirvísing um sjúkuna eigur at veitast avvarðandi og teimum, sum eru um tann sjúka. Avvarðandi eiga at verða avlastað.

Kommunulæknar, heimarøkt, demenssamskiparar, sjúkrahús, røktarheim, demensheim dagstovnar, Alzheimerfelagið, avvarðandi o.o. eiga at standa í tøttum samstarvi.

Verður hetta samskipað skilagott, og peningurin nýttur á rættan hátt, er nógv at spara. Hin sjúkurakti fær eina betri lívsgóðsku, soleiðis, at hann kann verða longri heima, og tí flytur seinri á røktarheim.

Við teimum røttu hugsjónunum og rættari handfaring, kunnu vit lætta um tilveruna bæði hjá teimum, sum verða rakt av sjúkuni demens og teirra avvarðandi, sum ofta kenna seg maktasleys.

Vit vilja tí heita á teir politikkarar, sum verða valdir at stýra, at hesar hugsjónir gerast veruleiki.

Vit síggja, at hetta ber væl til í londunum rundan um okkum.

# Sleppa undan hópuppsagnum?

**Hans Birgir Hansen**
*Limur í H.A.F. í Havnini*

Tað kann sleppast undan hópuppsagnum við at stytta arbeiðsvikuna, niður í 35 tíma arbeiðsviku og hækka arbeiðsviku, teim niðanfyri upp til 35 tíma arbeiðsviku.

Tað vil kunna skapa javnvág í vikutímatali teim mánaðar og tímaløntu, og skapa betri fíggjarstøði og sosiala trygdarneti undir familjuna og teim einstøku í dag.

Tað vil geva kvinnum og monnum atstøður at skiftast um at vera heima, fyrra- og seinnapart, og taka sær av tí dagliga húsarhaldi og børn og spara barnaansingina.

Tað hevur ein áður umrøtt í lesarabrøvum og fakfeløgini hava ikkki vilja tikið upp, slík sjónarmið í vil sleppa øllum undan hópuppsagnum, við niðursetta arbeiðstíð.

Tað sama er við skipan av náttúrligari frágongd av eldri starvsfólki og náttúrligari tilgongd av yngri fólki, ið kunna røkja uppgávur, í miðfyrisitingunum í Havnini.

Tað er hesin parturin ið eigur at vera kunna Landsstýri og aðalráðini, so vit fáa praktisera 35 tíma arbeiðsvikuna, skorið yvir ein kamb, innan almennar og landsstovnar.

Tað sama eigur at gera seg galdandi innan kommunur, privata og ríkisstovnar, í Havnini/Suðurstreymoy, fakfelagsfólki, hví gera tit ikki vart við slík sjónarmið.

Eg vil koma øllum óskipaðu og skipaðu, at fakfeløgum til lívs, í ikki eru solidarisk ímóti starvs-, arbeiðs- fakfelagsfólk/limir í øllum fakfeløgunum teim hópuppsøgdu.

Tað sama er við øllum teim óskipaðu og skipaðu í eru farin tvørtur um øll fakmørk, við álitisstørvum og hjáarbeiðum, ið avdúkar ósolidaritetin, hjá áðurnevndu. Hetta vil koma at avmarka fylgjur teim hópuppsøgdu og geva øllum betri atstøður at raðfesta /prioritera heima- og útiarebiði og áhugamál og privatlív í Havnini ídag.

Eg havi áður umrøtt slíkan fakfelagsruðuleika og politiska tilknýti, fakfelags forkvinnur og menn og nevndarlimir, ið røkja egin áhugamál, ístaðin fyri fakfelagslimir.

Eg vildi fingið slíkt skipað, ikki bert í Havnini, eisini úti í øllum landsins kommunum, á útoyggjum og útjaðaraoyggjar og meginoyggjar, hvat í ein vil gera vart við.

Eg havi nógv mikið at tríva í at skriva um fakfelagsruðuleika, við atliti arbeiðsmarknaðir arbeiðspláss.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



# Sjúkrakassi til náttúruheilivág

**Olga Hentze, heilsukostráðgevi, hevur stovnað ein grunn, sum skal verða eitt slag av sjúkrakassa hjá teimum, ið gerast sjúk og ynskja at nýta náttúruheilivág**

ALTERNATIV VIÐGERÐ
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Tey, sum hava áhuga í náttúruheilivági og alternativari viðgerð, kunnu koma á fund í Bládýpinum í Havn leygardagin klokkan 14.

Tá fer Olga Hentze, heilsukostrágevi, at greiða frá grunninum, sum hon hevur stovnað, sum hevur til endamáls, at økja um kunnleika hjá fólki til at fyribyrgja og viðgera heilsutrupulleikar. Grunnurin skal eisini kunna veita einstaklingum fíggjarliga hjálp fyri alternativa viðgerð.

Ein reglugerð er gjørd fyri grunnin, sum sigur, at øll kunnu gerast limir.

Mánaðarligu fundirnir hjá grunninum skulu ikki bara vera formligir fundir, men eisini ein hugnadagur hjá limunum, við sangi, dansi og samveru. Eisini verður heilsucafè við leskiligum og heilsugóðum mati.

Olga Hentze er fødd í Ukraine. Síðani hon var blaðung hevur hon havt áhuga í náttúruviðgerðarhættum. Hon hevur tikið fleiri skeið, bæði í Ukraine og Onglandi, eitt nú alternativum heilivági.

Eina tíð búði hon í Vestur Afrika, har hon hevði egna læknastovu, men í 2001 flutti hon til Føroya við familju sínari.

Í løtuni býr hon á Toftum, har hon hevur egna fyritøku sum heilsu- og kostráðgevi. Kostráðgeving ella terapi er rættiliga nýtt, og sertakliga í Føroyum, verður ikki hildið so nógv um slíkar viðgerðarhættir. Men sum við næstan øllum, so nýtist eisini hesum tíð at vaksa og mennast, sigur hon.



*Grunnurin, sum Olga Hentze hevur stovnað, skal umframt at veita fíggjarstuðul til alternativa sjúkuviðgerð, eisini skipa fyri hugnafundum fyri limunum. Á fundinum í Blådypinum, leygardagin klokkan 14.00, fer hon at greiða frá endamálinum við grunninum. Tá hevur tú eisini høvið at royna serstakliga leskiligan heilsukost, sum er eins lættur at gera til, sum maturin vit vanliga eta*

# Skatturin skal ikki forða

**Fíggjarmálaráðharrar í Norðurlondum arbeiða nú við at beina burtur skattligar forðingar hjá teimum, sum flyta seg millum einstøku londini**

SKATTALÓGGÁVA
*Jákup Mørk*

Bárður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, hevur júst verið í Stockholm, har hann hevur verið á fundi saman við norðurlendsku fíggjarmálaráharrunum.

Semja er millum fíggjarmálaráðharrarnar um, at arbeiðast skal við at beina burtur skattligar forðingar hjá teimum, sum flyta seg millum Norðurlondini. Bæði persónar og virki.

*- Føroyska arbeiðsmegin er vanliga mobil, og nógvir føroyingar arbeiða í hin-um Norðurlondunum. Tí kunnu vit í Før-oy-um fáa greiðar fyrimunir av, at skattligar forðingar verða beindar av vegnum"*, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjar-málum í tíðindaskrivi, sum í gjár varð sent fjølmiðlunum.

Umframt ítøkilig skattaviðurskifti, umrøddu ráðharrarnir ymisk fíggjar- og búskaparviðurskifti.

Ráðharrarnir eru á einum máli um, at tað hevur stóran týdning at leggja pening til síðis í góðum tíðum, so búskaparlig orka er at standa ímóti sveiggjum í búskapinum.

*- Àhugavert var at frætta, at fleiri av norðurlendsku grannunum - eins og vit í Føroyum -, hava skattalættar á skránni. Serligur dentur verður lagdur á at lække marginalskattastigan, soleiðis at fólk ikki verða so hart skattað av seinast vunnu krónunum"*, sigur Bárður Nielsen, ið staðfestir, at samgongan arbeiðir við júst somu broytingum fyri fíggjarárið 2005.

## VIÐMERKINGAR

# Sambandsflokkurin hevur ongantíð eksluderað nakran lim í 100 ára søgu floksins

**Johan Dahl,**
*løgtingsmaður*
*Tórshavn 11.11.04*



Tann sjónleikur, sum verður spældur av fyri okkum vanligu sambandsmonnum og -kvinnum kring Føroya land, nú í størsta kommuna í landinum, Tórshavnar kommuna skal skipa samgongu, er alt annað enn sømiligur og ikki sørt skaðandi fyri SAMBANDSFLOKKIN.

Somu fólk, sum nú enn einaferð eru um at fara til hendurs orsakað av maktgirnd, vóru saman við sambandsmonnum úr Havnini og Eysturoynni og partvís Klaksvíkini við til at koyra meg úr landsstýrissessinum – ivaleyst einamest tí teimum ikki dámdu meg sum persón – og tey kláraðu hetta »bragd« saman við einum løgmanni, sum boygnaði í kongunum.

Hvat hendi síðan við øllum ákærum og óhumsku, sum regnaði niður yvir mín kropp av alskyns slag – ONKI – fjølmiðlarnir bráðtagnaðu, og onki hoyrdist meir, tí alt var luftkasstellir og tramanskapur frá hesum fólkum og teirra viðspælarum, men málið var nátt.

Skommin er teirra – ikki mín.

Og nú gera so somu fólk enn eina fadesu av grovasta slag og vit, sum sita á síðulinjuni og tó ófrívilligt verða ein partur av sakini sum sambandsmenn og kvinnur, mugu bara rista við høvdinum og spyrja, hvat tað er, sum fyrigongur í hasum heksaketlinum í Havnini.

Tað má so absolutt verða nakað heilt galið við fólkunum.

Kanska er størsti trupulleikin hjá Føroya Væl, at teir ikki fáa mannað listan við nóg attraktivum valevnum? Og tí verða hesi vald upp á mangul av betri??

Heðin hevur gjørt ein bukk, men ein maður, sum er hildin niðri og burturi frá maktini sum borgarstjóri í Havnini av sínum egna valøkið øll árini sum lokalpolitikkari og kanska eisini sum landspolitikkari, er kanska farin heilt í svart av hesi mótstøðu, nú hann sær í eyguni, at hetta er seinasta útkall, um hann skal blíva borgarstjóri í Havnini.

Tað rættvísger sjálvandi ikki, at gjørdar verða tvær avtalur.

Hví skal so hetta kommunuvalið, sum tað jú er, blíva til ein landspolitiskan trupulleika?

Hetta hóast tað at landspolitikkarin als onki kann gera við støðuna, als onga ávirkan hevur á málið.

Hví skal Heðin Mortensen avhøvdast av Føroya Væl, tá liminir í Sambandsflokkinum í Tórshavnar Býráð ikki eingang fingu eina nøs fyri at reka meg úr landsstýrissessinum og harvið blanda seg upp í landspolitikkin, har teir als onki høvdu at gera??

Hesi tingini hanga ikki saman.

Hvat nú um sami trupulleiki stingur seg upp t. d. í Klaksvík, Vági ella Tvøroyri??

Skal so formaður floksins og valfelag aftur út at ekskludera limir, tí teir ikki akkurát floyta í sama tóna?

Einasta valfelag, sum veruliga er gingið nógv aftur fyri Sambandsflokkin, er tað í Havnini.

So eigur ein sjálvandi at verða kritiskur og spyrja hví??

Sambandsflokkurin misti knappar 1000 atkvøður til býrðsvalið í Havnini.

Heðin Mortensen fekk yvir 600 atkvøður - ella hálvaaðru ferð so nógv sum Beata og Høgni tilsamans - tað sigur ikki so lítið.

At fara at siga mannin úr flokkinum, tí hann ikki hevur uppført seg eksemplariskt, er púra burturvið.

Setið tykkum heldur niður – tit havnarmenn – og tosið saman sum vaksin fólk, heldur enn at gera sambandsfólki og Sambandsflokkinum fyri skommum enn einaferð við tykkara ósømiliga atburði.

Ongantíð í søgu floksins er nakar sagdur úr flokkinum, og eigur ein skeiv undirskrivt hjá Heðini ikki kosta honum at verða blakaður úr flokkinum.

Gera tit tað, so hava TIT veruliga ein trupuleika vildi eg mett.